Skjal 1.

## Útroknan av fiskiorku á Føroya Banka samsvarandi kunngerðaruppskotinum

**<u>Bólkur 3</u>**

Kunngerðin ásetir, at fiskifør í bólki 3 undir einum fáa 150 fiskidagar ella 8 fiskidagar í part. Undir vanligum umstøðum er ikki tørvur á at sigla aftur at landi innanfyri 8 dagar. Um øll fiskiførini í bólkinum gera brúk av egnum rættindum, so er talan um, at 8 fiskidagar verða til 7 effektivar fiskidagar fyri hvørt fiskifarið (sigling til og frá fiskileið trekt frá).

Frystilínuskipini seta í miðal 40-50.000 húkar pr. 24 tímar. Roknað uppá 8 fiskifør í 7 fiskidagar uppá hvør skipið gevur (45.000 x 8 x 7) ella tilsamans 2.520.000 húkar.

Ísfiskalínuskipini seta í miðal 30-40.000 húkar pr. 24 tímar. Roknað uppá 11 fiskifør í 7 fiskidagar uppá hvørt skipið gevur (35.000 x 11 x 7) ella tilsamans 2.695.000 húkar.

*<u>150 fiskidagar hjá bólki 3 geva sostatt eina fiskiorku uppá umleið 5.215.000 húkar</u>*.

**<u>Bólkur 4</u>**

Kunngerðin ásetir, at fiskifør í bólki 4 undir einum fáa 150 fiskidagar ella 8 fiskidagar í part. Bókur 4 fevnir um tvey skipasløg, tey við egningarmaskinu og tey við egning í landi.

Roknast má við, at fiskiførini <u>við egningarmaskinu</u> gera tveir túrar í 8 dagar, harav 2 dagar fara til sigling, t.v.s. at dagarnir hjá hesum í miðal eru 75 % effektivir fiskidagar og 8 fiskidagar verða soleiðis til 6 fiskidagar.

Bátarnir í bólki 4 við egningarmaskinu seta í miðal 25-30.000 húkar. Roknað uppá 4 fiskifør í 6 fiskidagar uppá hvønn bátin gevur tað (27.500 x 4 x 6) ella tilsamans 660.000 húkar.

Bátarnir í bólki 4 <u>uttan egningarmaskinu</u> seta í miðal 15-18.000 húkar. Um restin av fiskidøgunum (118) hjá bólki 4 verða brúktir av fiskiførum uttan egningarmaskinu við einum effektiviteti uppá 66 % so gevur tað (16.500 x 118 x 0,66) ella tilsamans 1.285.020 húkar.

*<u>150 fiskidagar hjá bólki 4 geva sostatt eina fiskiorku uppá umleið 1.945.020 húkar</u>*

**<u>Bólkur 5</u>**

Kunngerðin ásetur, at fiskifør í bólki 5 undir einum fáa 30 fiskidagar sum felags fiskidagar. Roknast má við, at ein útróðrarbátur í bólki 5 í fiskiskap við línu hevur tørv á at sigla aftur at landi eftir hvørja setu, partvís eftir reiðskapi og partvís at landa.

30 línufiskidagar hjá bólki 5 verða sostatt ongantíð til annað enn 30 effektivir dagar hjá hesum bólki.

Ein útróðrarbátur í bólki 5 setur í miðal 12.000-15.000 húka pr. 24 tímar. *<u>30 fiskidagar hjá bólki 5 (um alt gerst línudagar) geva sostatt (13.500 x 30) ella eina fiskiorku uppá samlað 405.000 húkar</u>*

Skjal 1.

**<u>Kunngerðin samlað</u>**

Kunngerðin leggur sostatt upp til, at 7.565.000 húkar verða settir á Føroya Banka í 2022. Umroknað til fiskiorku, so fær:

- bólkur 3 tillutað uml. 70 % av loyvdu fiskiorkuni
- bólkur 4 tillutað uml. 26 % av loyvdu fiskiorkuni
- bólkur 5 fær tillutað millum 0 og 4 %, alt eftir um dagarnir verða brúktir sum snellu ella snørisdagar ella dagarnir verða brúktir sum línudagar

Bólkabýtið í % av heildarkvotu av toski og hýsu sambært lógina í 1994

Bólkabýtið í fiskidøgum sambært lógina í 1996